## DAGSINS MEINING

# Forsetaval

Í dag er forsetaval í USA. Hetta val viðkemur ikki bert fólkinum, sum býr í USA, hetta viðkemur øllum heimsins tjóðum. USA er vorðið heimsins sterkasta land, og amerikanskur politikkur ávirkar allan heimin. Bush fyrisitingin er dømi um eina ta mest konservativu stjórn, ið USA nakrantíð hevur havt. Hetta sæst aftur í skattapoliitkkinum, í vinnupolitikkinum, uttanríkispolilitikkinum og ikki minst í rættarpolitikkinum. Taka vit hetta síðsta økið fyrst, so visti NRK mánamorgunin at siga, at Bush sum guvernørur var tann guvernørur í amerikansku søguni, ið hevur undirritað flestar deyðadómar, nevniliga 150! Eftirfylgjandi hevur tað víst seg, at nøkur ósek fólk eru vorðin tikin av døgum. Bush ætlar at halda fram við sínum harðrenda/víðgongda rættarpolitikki eitt nú við at tilnevna fleiri nýggjar og sera konservativar hægstarættardómarar. Hesir sita sum kunnugt fyri lívið og hevur hægstirættur sera stóra ávirkan á rættarpolitikkin. Tað er tí eitt stórt afturstig fyri rættartrygdina, um Bush verður afturvaldur í dag.

Undir Bush eru tey ríku vorðin ríkari og tey minni ríku vorðin fátækari. Skúlaverk, almanna- og heilsuverk og kollektiva undirstøðukervið eru sett ár aftur í tíðina. Umhvørvis- og orkupolitikkuirn gagnar bert big business og bústaðarpolitkkurin er vorðin ein sonn vanlukka. Uttanríkispolitikkurin hevur ført til, at USA hevur mist at kalla allar sínar vinir uttan Bretland, har vinalagið nú er farið at rilla. Týskland, sum í áratíggjur var trúgvasti sameindi USA, hevur leingi verið sera atfinningarsamt. Europa er slept upp á fjall og uttanríkispolitikkurin sum heild verður undirlagdur innanríkispolitiskum seráhugamálum.

Bush umboðar ein "eyga fyri eyga og tonn fyri tonn" hugburð, sum er púra fremmandur fyri tann annars so framkomna og sivileraða vesturheimin. Harnæst umboðar hann einvíst trong og avmarkað vinnuáhugamál og stórur ivi er sáddur um hansara moralska støði eitt nú við, at tað alment er komið fram, at hann og hansara umhvørvið fyri 11.september hava havt gott samband við lond og bólkar, sum stuðla yvirgang, eitt nú Osama bin Ladin og hansara harkalið.

Leiðararnir í vesturheiminum hava mist álitið á Bush, og flestu teirra meta ikki, at hann er skikkaður at standa á odda fyri vesturheiminum, sum stendur fyir demokratii og humanismu. Hitt valevnið John Kerry hevur alt tað, sum skal til fyri at gerast ein góður forseti og leiðari av vesturheiminum. Hann er vitandi og royndur, hann hevur sera greið poltisk mál bæði á innanríkispolitiska og á uttanríkspolitiska økinum. Hann ætlar snøgt sagt at føra vælferðarpolitikkin hjá Clintonstjórnini víðari. Hetta ger hann ikki bert tí hann er ein rætthugsandi humanistur, men tí hann dugir at síggja, at USA tolir ikki fýra ár afturat við tí víðgongdu konservatismu, sum Bush umboðar. Uttanríkspolitiskt er hann sinnaður at lata USA átaka sær tær skyldur, sum liggja á herðunum á einum demokratiskum stórveldi. Tað er lítið at ivast í, at USA og heimurin sum heild eru best farin við Kerry sum forseta. Avgerðina eigur amerikanska fólkið í dag. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sum sild í tunnu í svimjihøllini

**Annika Olsen**
*Valevni Fólkafloksins til Býráðsvalið*




Svimjihøllin í Gundadali er eitt frálíkt tænastutilboð til borgararnar í Havn - ein oasa, har borgararnir kunnu taka sær av løttum, motionera, spæla sær, hugna sær við børnunum osfr. Trupulleikin er, at íbúgvaratalið í Tórshavnar kommunu alsamt veksur og økir hetta um trýstið á svimjihøllina, so at fólk hvørki fáa hugna sær ella svomi sær nakrar longdir, tí tey føla seg sum sild í tunnu.

Tá ið talan kemur til kappsvimjing, sum eg persónliga havi stóran áhuga í, so letur tað seg næstan ikki gera at venja í svimjihøllini í Gundadali vegna plásstrot. Teir ungu svimjararnir verða kroystir saman á ein bana, tí pláss skal verða fyri øllum hinum, ið leita sær niðan í svimjihøllina. Um vit skulu hava svimjarar á altjóða støði, so er tað neyðugt við fleiri venjingartíðum og pláss til svimjararnir í Havn. Tað besta hevði verið, um vit fingu eitt rættuligt svimjistadion tvs ein svimjihyl, sum er 50 metrar til longdar við góðum áskoðaraplássum, so at vit í Havn í framtíðini kunnu standa fyri altjóða kappingum, eitt nú EM, VM, World Cup og Oyggjaleikum. Vit hava nógvar góðar svimjarar, sum longu hava luttikið á altjóða støði eitt nú EM, og nógvir ungir svimjarar gera seg alsamt meiri galdandi á altjóða støði. Ein tann kendasti føroyski svimjarin, ið hevur staðið seg væl í altjóða høpi, er Heidi Andreassen, ið hevur vunnið fleiri EM, VM og OL merki.

Eisini á Oyggjaleikum hava føroyskir svimjarar staðið seg ógvuliga væl gjøgnum árini, har merkið hevur verið á stong, og tjóðsangurin hevur ljóðma í høllini. Tað er tí ógvuliga umráðandi, at vit stuðla føroyskari svimjing, so at hon kann gerast enn betur og gera seg galdandi millum aðrar aljóða svimjitjóðir. Um vit vilja nakað við føroyskari svimjing, er tað neyðugt við einum svimjistadion, sum hevði verið til stórt gagn fyri okkara fremstu ítróttarfólk, svimjararnir. Harumframt hevði hetta eisini ført við sær, at trýstið á svimjihøllina í Gundadali hevði lækkað og harvið hækkað tænastustøði fyri borgarnar í Havn, bæði teimum, sum ynskja at motionera, og teimum, sum ynskja at taka sær av løttum

Undir fólkafloksins leiðslu er fíggjarstøðan í Tórshavnar kommunu vorðin sera góð, og kommunan er í dag so at siga skuldarfrí. Við hesum atlitinum fyri eyga eigur rúm at vera fyri, at peningur kann leggjast til síðis til eitt svimjistadion í nærmastu framtíð. Hetta er í hvørt fall eitt mál, sum liggur mær tætt at hjarta, og vil eg arbeiða fyri, at hetta kann gerast veruleiki.

# Ein grønari dámur

**Tórfinn Smith**
*Býráðslimur og valevni Javnaðarfloksins*




Á umhvørvisøkinum er nógv hent hesi seinastu árini, og tað kann eg bert, sum formaður í Heilsu- og Umhvørvisnevndini seinastu trý árini, fegnast um. Ikki minst tí, at alt býráðið, hevur tikið so dyggiliga undir við tí, sum hent er, og tað haldi eg eisini, at fólk flest gera.

Nú sleppa fólk, hvønn dag, lætt og skjótt av við sítt burturkast á snotiligu endurnýtsluni niðanfyri brennistøðina, har fólk samstundis skilja ruskið til endurnýtslu av ymiskum slag.

Í fjør fóru vit undir at skilja pappír frá øðrum húsarhaldsburturkasti. Eg má viðganga, at enn eru ávísir byrjunartrupulleikar, men stórt sæð riggar skipanin væl.

Í løtuni fyrireika vit eina nýggja roykreinsiskipan til brennistøðina, sum verður sett upp í 2006. Tá lúkar brennistøðin øll altjóða umhvørviskrøv.

Endamálið við hesum og komandi tiltøkum á umhvørvisøkinum er, at lætta um hjá fólki, og at skipa okkum so umhvørvisvinarliga sum gjørligt. Umhvørvið hava vit bert til láns, og skal tí varðveitast sum best til komandi ættarlið.

Umhvørvisspurningar eru raðfestir frammalaga. Kommunan hevur fingið ein grønari dám.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.
Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Opinleiki og gjøgnumskygni aftur i býráðsarbeiði

**Jan Poulsen**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*




Nú má tað verða greitt fyri ein og hvønn, at vit mugu hava meiri opinleika og gjøgnumskygni í býráðsarbeiðnum.

Trætan millum Starvsmannafalagið og Tórshavnar Býráð er komin so langt, at Starvsmannafelagið hóttir við at teir ikk longur vilja brúka orku at tosa við býráðið, tí tað nyttar onki.

Tórshavnar Býráð kann ikki vera so arrogant, at tað ikki vil tosa við Starvsmannafelagið og loysa teir trupulleikar, sum eru. Trupulleikar eru til fyri at loysa, sigur eitt gott orðatak.

Teir valdu politikkarar sum umboða fólkið í kommununi, hava skyldu at takað sær av áhugamálunum hjá fólkinum, so væl sum møguligt.

Sitandi borgarstjóri segði fyri meira enn hálvum ári síðani, at tað var fínt, um Starvsmannfelagið fór í rættin við øllum málunum, so tey kundu verða loyst. Hann skuldi heldur sett seg niður og roynt at funnið eina loysn.

Aftur í Sosialinum í hesari vikuni sigur borgarstjórin, at tað er bara heilt fínt, um Starvsmannafelagið leggur ósemjurnar fyri rættin.

Haldi tað vera alt ov barnsligt av borgarstjóranum at bera seg soleiðis at, og bara at seta seg hendur í favn og siga, "far bara í rættin við øllum ósemjunum", ístaðin fyri at loysa tær, sum hann átti at gjørt.

Eftir tí, sum formaðurin í Starvsmannafelagnum segði við Sosialin, so kom hettar at kosta Tórshavnar kommunu einar 500.000 kr í sakarmálskostnaði. 500.000 kr av skattaborgarans peningi, sum Tórshavnar kommuna ætlar at tveita burtur til sakarmál, bara tí teir ikki vilja seta seg niður og viðgera ósemjurnar við Starvsmannafelagið.

Tá Løgtingsins Umboðsmaður skuldi flyta bústað, var tað onkur sum tók til, at hann allarhelst flutti inn hjá Tórshavnar kommunu.

Tað eru eisini fleiri spurningar, sum fólk hava sett sær, um hvussu og til hvønn Tórshavnar Býráð gevur rætt til at byggja, eitt nú íbúðir og annað her í kommununi.

Øll hesi mál eru ókend fyri borgararnar, men um tað hevði verið meiri opinleiki og gjøgnumskygni í Býráðnum, so hevði tað ikki verið sum nú, har tað eru fleiri spurningar enn svar.

Sum onkur tók til her fyri: "Vit mugu koma burtur frá Kondittarípolitikkinum og fara aftur til at føra rættan kommunalpolitikk!"

Bæði Starvsmannafelagið, onnur feløg og allir borgarar í kommununi kunnu verða vísir í, at Javnaðarflokkurin og tey fólk, sum koma at umboða Javnaðarflokkin í býráðsarbeiðnum eftir hetta valið, fara at seta seg niður og fáa greiðu á hesum viðurskiftum til gagns fyri øll.

Vit vilja taka trupulleikarnar upp og konstruktivt saman við feløgum og øðrum finna semjur og loysa málini.

# Framtíðar Havnin!

**Heini Magnussen**
*Valevnið Fólkafloksins til Býráðsvalið í Havn*




Havnin skal framhaldandi verða lokomotivið í Føroyum, og ganga undan á øllum økjum. Vit skulu hava góðar og fjølbroyttar bústaðarmøguleikar soleiðis at flest øll kunnu fáa sín tørv nøktaðan. Kommunan skal tryggja at útboði av bústaðartilboðum á marknaðinum altíð er nóg stórt. Soleiðis kunnu vit tryggja at góðska og príslega altíð hanga saman.

Kommunalu myndugleikarnir at virka fyri, at ungfólk betri og skjótari kunnu seta føtur undir egi borð. Kommunan eigur at ávirka landsmyndugleikarnar og fíggjarstovnar soleiðis at fíggingar- møguleikarnir til ung støk og hjún eru so rímulig, at til ber hjá øllum sum vilja at útvega sær eina íbúð ella eitt hús.

Bæði tann gamli býurin og tann nýggji uppi í Hoyvíkshaganum eigur at mennast soleiðis at trivnaðurin er í hásæti.

Vit skulu hava nóg mikið av fjølbroyttum barnaansingarmøguleikum, frítíðarskúlar, barnaskúlar, framheildsskúlar, fakskúlar og hægri skúlar .

Mentunarkarmarnir eiga at fáa rúmar ræsir. Frítíðarundirvísing, ítróttarfeløg, ungdómsfeløg, áhugabólkar innan mentan v.m.eiga at fáa styrk frá kommununi – sum hjálp til sjálvhjálp.

Vit eiga at virka fyri einum reinum umhvørvi og einari vakrari og reinari náttúru. Náttúran kring Havnina er sera vøkur og eru tað nógv fólk sum hava gleði av henni. Vit eiga tí framhaldandi at gera smáar gøtur inni á fríøkjum og fram við áunum. Ì samstarvi við bóndirnar eiga vit at tryggja at gangandi er í haganum og at gomlu varðagøtunar eru farbærar.

Hesum vil Fólkaflokkurin virka fyri !

# Býráðið og bygdirnar

**Jógvan Arge**
*býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin*




Tjóðveldisflokkurin heilsar Kirkjubø, Velbastað, Nólsoy, Hesti og Koltri vælkomnum upp í Tórshavnar Kommunu.

Hesar samanleggingar gera Tórshavnar kommunu til eitt sera fjølbroytt samfelag. Tað setir stór krøv til tey, sum stíla fyri kommununi.

Okkara stevnumið er, at tey nýkomnu fáa somu sømdir sum borgarnir í kommununi annars við virðing fyri teirra sereyðkennum og møguleikum.

Endamálið er at tryggja lív og menning á øllum plássum í Tórshavnar Kommunu.

Vit vilja, at kommunala umsitingin leggur dentur á at fylgja upp málum, sum hava við oyggjar og útriðir at gera, so tey ikki hvørva í rúgvuni.

Royndirnar við t.d. Kollafirði vísa, at tað knípur hjá býráðnum at hava nóg góða umsorgan fyri teimum nýggju pørtunum av kommununi. Har eru alt ov nógvir leysir endar.

Tí mæla vit til, at umsitingin verður skipað soleiðis, at øll mál, sum hava við bygdir og útriðir at gera, ganga um eina skrivstovu, so kommunan hevur greitt yvirlit yvir, hvat har krevst og rørist.

Vit ætla at hava vakið eyga við teimum møguleikum, sum eru fyri menning og trivnaði á plássunum.

Vit miða eftir, at tær lokalu nevndirnar verða virdar meir enn higartil og vilja virka fyri, at tær fáa ávirkan.

Fólkið í allari kommununi eigur at hava møguleika fyri at nýta tey frítíðartilboð, sum eru í høvuðsstaðnum, og til tess eigur kommunan at skunda undir betri ferðasamband á bæði á landi og sjógvi.

X við E.

# Úrslitini tala fyri seg!

**Heðin Mortensen,**
*býráðslimur*




Tað er lætt at reypa undan einum vali, men tað eru bara úrslitini, ið telja. Loystu málini hava verið mong síðstu fýra árini, og tí vil eg arbeiða fyri at loysa eldraøkið líka so skjótt og gott, sum vit loystu barnaansingina.

Kunsturin við politikki er ikki at rópa harðast og reypa mest, men at vísa í verki, hvør dugur er í. Tað ræður um at standa aftan fyri síni orð og fremja loysnir - og ikki bara at tosa um tær.

Í hesum døgum eru bløðini á tremur, har politikarar taka æruna fyri bæði hetta og hatta. Tað er eisini í fínasta lagi, um teir altso hava gjørt so nógv til nyttu, sum teir breggja sær av.

Onkur hevur sagt, at ein góður politikari »heldur meira, enn hann lovar«. Hetta eru nokk sannleiksorð, ið verða so dyggiliga staðfest í júst hesum valstríðnum, tí verri enn so altíð er samanhang millum vallyftini og sjálvt innihaldið í teimum.

Serliga dúglig eru summi av valevnunum at lova, at farast skal í gongd við nógv, sum tó í veruleikanum longu langt síðani er farið í gongd - og okkurt mestsum longu liðugt!

### Sjón fyri søgn

Sum dømi kann eg nevna, at vit longu hava:
- loyst barnaansingartørvin
- gjørt kommununa skuldarfría
- gjørt heildarætlan 25 ár fram í tíðina
- givið ítróttinum betri karmar
- gjørt fleiri parkeringspláss
- útbygt og betrað vegakervið
- útvegað fleiri bátapláss

og nógv, nógv annað, ið aðrir nú annaðhvørt taka sær æruna av ella enntá lova at gera, um teir verða valdir.

Farnu fýra árini hava vit fingið loyst so nógv stórmál sum kanska ongantíð fyrr í einum valskeiði. Men vit eru ikki komandi sovandi til nakað av tí, tí aftanfyri liggur stórt arbeiði og stórur innsatsur.

Tað tykist, sum flestøll eru samd um, at nú standa tey eldru fyri tørni, og tað er eisini púrasta rætt. Eg fegnist eisini um, at fleiri nú taka undir við, at eldraøkið eigur at vera fyrsta prioritering hjá komandi býráð.

### Víst í verki

Vit hava longu víst í verki, at vit meina hetta í álvara, tí skjøtil er longu settur á eldraøkið við:
- heimi til minnisveik
- keypi av húsi til ellisheim og umlætting
- eldravitjan til allar borgarar yvir 75 ár aldur

og so framvegis.

Men meira skal til, og eg fari at gera alt fyri at fáa sett eldraøkið ovast á breddan - og tá meini eg eftir kommunuvalið, tá farast skal til verka. Eg fari at seta alt inn uppá, at eldraøkið fær líka skjóta og góða loysn, sum barnaansingin fekk tað.

Hygg at teimum úrslitum, vit hava fingið hesi fýra árini, so sigur tað seg sjálvt, hvør eisini dugir at fáa loyst ta næstu stóru avbjóðingina hjá Tórshavnar kommunu.

# Gjald fyri valgreinar

Nú kommunuvalið er lýst, og fleiri vallistar eru almannakunngjørdir, fara vit eins og til undanfarin val at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið fyri valgreinar er hálvur lýsingaprísur.

**Sosialurin**